Stevna Vágatunnilin eftir milliónum í endurgjaldi

– Fáa vit ikki arbeiðið at gera vegirnar til Vágatunnilin, er tað heilt greitt, at vit fara at stevna eftir endurgjaldi, sigur Tummas Sørensen, stjóri í Byggitek

ÁKI BERTHOLDSEN

–Fáa vit ikki arbeiðið at gera vegirnar til Vágatunnilin, er tað sjálvsagt, at vit fara at krevja endurgjald.

Tummas Sørensen, stjóri á Byggitek sigur, at tað, sum er farið fram í sambandi við, at arbeiðið uppá at gera vegirnar til Vágatyunnilin, ber brá av einari gølu.

–Tá ið tilboðini vórðu latin upp, høvdu vit tað lægsta tilboðið og samstundis mæltu báðir ráðgevararnir hjá Vágatunlinum, Landsverkfrøðingurin og Landsbyggifelagið, til at vit fingu arbeiðið.

– Men kortini setir leiðslan í P/F Vágatunlinum ráðgevingina til viks og tekur samráðingar upp við J&K Petersen, sum høvdu næstlægsta tilboð, um at gera arbeiðið.

Tummas Sørensen sigur, at tað, sum fer farið fram, er beint ímóti útbjóðingarlógini og tað er eisini ímóti teirri siðvenju og teimum føstu mannagongdum, sum eru galdandi á økinum.

– Tí gjørdu vit beinanvegin leiðsluni fyri P/F Vágatunlinum greitt, at vit tóku fyrivarni fyri at reisa endurgjaldskrav, um vit ikki fingu arbeiðið.

Og hann leggur afturat, at tað er sjálvsagt, at hetta endurgjaldskrav verður reist.

Hann sigur, at vanliga liggja slík endurgjaldskrøv um eini 15% av tilboðnum.

Tilboðið hjá Byggitek var slakar 21,7 milliónir. Sostatt fer endurgjaldskravið til P/F Vágatunnilin at liggja um 3,2-3,3 milliónir.

Men Tummas Sørensen leggur afturat, at tað, sum Vágatunnilin ger, kann eisini skaða umdømi hjá Byggitek.

– Ein grundgeving fyri at snúgva sær uttanum Byggitek, er, at vit skulu ikki vera so sterkir fíggjarliga.

–Sagt verður, at J&K Petersen er sterkari fíggjarliga og tað hevur størri tekniska leiðslu og fíggjarliga orku, og tí verður mettur at gera arbeiðið liðugt til tíðina.

– Hvør skal siga, at tað hevur Byggitek ikki.

Tummas Sørensen sigur, at Byggitek varð frammanundan góðkent at vera ført fyri at gera arbeiðið, tí varð felagið boðið uppí útbjóðingina.

Tummas Sørensen hevur ikki mist vónina um, at P/F Vágatunlinum fer at taka samráðingar upp við Byggitek. Fyribils ber hetta brá av eini gølu, sigur hann

–Og vit skulu minnast til, at tað er ikki eitt privat felag, sum nú oyðileggur okkum umdømi. Tað eru tær almennu Føroyar. Hetta er rættiliga álvarsligt og tað verður eisini lagt upp fyri tí í einum endurgjaldskravi, sigur Tummas Sørensen.

–P/F Vágatunnilin hevur als onki at hava hesar metingar í, tí leiðslan har hevur enn ongantíð verið í sambandi við okkum um arbeiðið.

–Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur álagt Vágatunlinum at tosa við okkum, men hesin fundurin er nú avlýstur tvær ferðir og óvist er, nær hann verður.

Leiðslan í P/F Vágatunlinum hevði tilskilað sær rætt til at velja og vraka ímillum tilboðin?

–Hesa tilskilingina hevur leiðslan í P/F Vágatunlinum fullkomiliga misskilt, sigur Tummas Sørensen. Hetta er ein tilskiling, sum ongantíð verður brúkt, uttan so at okkurt heilt serligt tekur seg upp frá tí, at arbeiðið verður boðið út til tilboðini verða latin upp. Og í hesum føri er onki slíkt hent, sum kann rættvísgera, at hendan tilskilingin verður brúkt.

Tað er útfrá eini heildarmeting, at leiðslan fyru P/F Vágatunlinum metir, at tilboðið hjá J&K Petersen tænir byggiharranum fræggast.

Umframt tey fíggjarligu viðurskiftini, hevur Vágatunnilin gjørt eina uppstilling, sum vísir, at samanumtikið verður tilboðið hjá J&K Petersen 300.000 krónur bíligari enn tað hjá Byggitek. Hettta m.a. tí, at J&K Petersen skal hava givið eitt fast boð, men samstundis verða 5% lagt afturat tilboðnum hjá Byggitek fyri meiri arbeiði ið altíð stendst av slíkum byggiætlanum.

Samstundis verður roknað við ymsum avsláttrum.

– Eftir lógini um útbjóðing, er tað bara lægsta tilboð, sum kann lækka sítt tilboð enn meiri.

– Hetta kunnu hinir tilboðsgevararnir ikki gera, sigur Tummas Sørensen.

Hann leggur afturat, at hann hevur kortini ikki enn mist vónina um, at P/F Vágatunnilin fer at bera seg at sum einhvør annar byggiharri og tekur upp samráðingar við lægsta tilboð, ístaðin fyri at halda fast um kryptiskar, og kanska ólógligar, lækkingar at næstlægsta tilboði.

Les eisini grein aðrastaðni í blaðnum, har Tummas Sørensen greiðir frá gongdini í málinum.

Undir alt lágmark

–Vit venda okkum frá slíkari framferð, sigur Føroya Handverksmeistarafelag um framferðina hjá leiðsluni fyri P/F Vágatunlinum

ÁKI BERTHOLDSEN

– Hetta er undir alt lágmark.

Hendan lemjandi dóm hevur Føroya Handverksmeistarafelag nú felt yvir leiðsluna í partafelagnum Vágatunlinum.

Tað er í sambandi við, at arbeiðið uppá vegirnar til undirsjóvartunnilin varð boðið út, at Føroya Handverksmeiarafelag fellur so harðan kritik yvir leiðsluna fyri P/F Vágatunnilin.

Arbeiðið at gera vegirnar í sambandi við vágatunnilin varð boðið út í innbodnari lisitatión, har sjey feløg vórðu boðin við.

Tá ið tilboðini vórðu latin upp, hevði Byggitek lægsta tilboð.

Men kortini hevur nevndin fyri P/f Vágatunlinum gjørt av at samráðast við J&K Petersen, sum hevði næstlægsta tilboð um at gera arbeiðið.

Vágatunnilin sigur, at útfrá eini heildarmeting er tað tilboðið hjá J&K Petersen, sum gagnar Vágatunlinum best.

Framferðin hjá leiðsluni fyri P/F Vágatunlinum í sambandi við útbjóðingini av arbeiðnum at gera vegir til Vágatunnilin, er undir alt lágmark, sigur Føroya Handverksmeistarafelag

Eitt nú sigur Vágatunnilin, at J&K Petersen hevur latið eitt fast tilboð, men tað hevur Byggitek ikki.

Tí hevur leiðslan í Vágatunlinum mett, at tað er rætt at leggja 5% afturat tilboðnum hjá Byggitek fyri eykaarbeiði, sum altíð stendst av eini slíkari bygging.

Aðrar orsøkir vóru eisini til, at Vágatunnilin samanumtikið metti, at tilboðið hjá J&K Petersen var betri, miklan ans í byggivinnuni.

Og í fyrstu syftu gjørdi Føroya Handverksmeistarafelag av at boykotta Vágatunnilin.

Tað varð gjørt við at nokta limum sínum at samráðast við tunnilsfelagið um nakað sum helst arbeiði.

Síðani hevur Føroya Handverksmeistarafelag fingið eina frágreiðing frá leiðsluni í P/F Vágatunlinum, og tað fekk meistarnar at ógilda boykottið.

Men Meistararnir gera samstundis greitt, at teir framvegis ætla sær at kanna, um alt er rætt farið fram.

Og koma teir eftir, at okkurt er at finnast at, fara teir helst at taka málið upp aftur.

Og í eini formligari fráboðan í kvøld, boðar Føroya Handverksmeistarafelag so frá, at tað má staðfesta, at framferðin hjá P/F Vágatunlinum hevur verið undir alt lágmark í sambandi við viðgerðina av teimum tilboðum, sum komu inn uppá arbeiðið at gera vegir, brúgv og annað í sambandi við tunnilin.

–P/F Vágatunnilin hevur bjóðað sjey fyritøkum at geva tilboð uppá vegir, brúgv o.a. til Vágatunnilin, sigur Føroya Handverksmeistarafelag.

– Táið so tilboðini koma inn, er tað vanliga tilboðið hjá tí eina byggifelagnum 2,4 milliónir lægri enn tað næstlægsta tilboðið.

Á tí alternativa tilboðnum, sum Vágatunnilin arbeiðir við, er munurin 1,6 million.

– Landsverkfrøðingurin, sum hevur 50 ára royndir á hesum øki, og hevur verið nevndur sum serfrøðingur, mælir til at byggifelagið við tí lægsta tilboðnum fær arbeiðið.

– Men P/F Vágatunnilin fer uttanum ráðgevingina og fer í samráðingar við ein annan tilboðsgevara enn tann, sum ráðgevarin mælti til. Fyri at rættvísgera seg sjálvan, kemur P/F Vágatunnilin við ivasomum útalilsum, sum skaða fyritøkuna, teir sjálvir hava biðið um at geva tilboð, og, sum er 1,6 millión bíligast, sambært tilboðunum. Við at bera seg soleiðis at, kann P/F Vágatunnilin eisini skaða umdømi hjá hinum byggifelagnum sigur Handverksmeistarafelagið.

Og síðani leggur felagið afturat:

–Føroya Handverksmeistarafelag stendur spyrjandi: Er hetta ein framferðarháttur, sum vit kunnu vænta okkum í framtíðini?

– Føroya Handverksmeistarafelag vendir sær frá slíkari framferð. Eisini vóna vit, at politiska skipanin ger tað sama og rættir tað, sum møguliga er skeivt, sigur felagið.

Undir lagt lágmark

Framferðin hjá leiðsluni fyri Vágatunnilin hevur vakt óvist er, nær hann verður.

Landsstýrið broytt samráðingarútspælið

Fyri at fáa avtalu við donsku stjórnina um góða búskaparliga skiftistíð hevur landsstýrið endurskoðað upprunaliga samráðingarútspælið

JOHN JOHANNESSEN
ÚR KEYPMANNAHAVN

Landsstýrið fer á samráðingarfundinum við donsku stjórnina hósdagin at leggja fram nøkur nýggj modell fyri góðari búskaparligari skiftistíð.

Hetta ger løgmaður greitt í brævi, hann sendi danska forsætisráðharranum seinasta fríggjadag.

Løgmaður vísir í brævinum forsætisráðharranum á, at tað heilt greitt stendur í avtaluni, danska stjórnin gjørdi við landsstýrið í juni 1998, at samráðast skal um eina búskaparliga skiftistíð, ið miðar ímóti at byggja upp ein sjálvberandi føroyskan búskap.

Tí roknar løgmaður við, at partarnir á fundinum hósdagin fara at samráðast konstruktivt um at skapa grundarlag fyri hesum sjálvberandi føroyska búskapinum.

Fyri at hetta skal bera til, fer landsstýrið at leggja nøkur modell fyri stjórnina, ið ikki fyrr hava verið á samráðingarborinum.

Bundið seg at samráðast

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, vísir eins og løgmaður á, at danska stjórnin í avtaluni frá 1998 hevur bundið seg til at samráðast um eina góða búskaparliga skiftisskipan fyri Føroyar.

Tí heldur hann tað vera púra burturvið, um stjórnin á fundinum hósdagin fer at halda fast við, at skiftistíðin ikki verður longur enn fýra ár.

Høgni Hoydal heldur, at stjórnin, tá hon heldur fast um skiftistíðina, sýnir, at hon als ikki vil samráðast við føroyingar um at byggja upp ein sjálvberandi føroyskan búskap. Tískil brýtir stjórnin avtaluna frá 1998, og hetta metir hann vera ógvuliga álvarsamt fyri eitt land, sum Danmark.

Landsstýrið fer tískil á fund hósdagin við góðum vónum um at fáa glið á veruligar samráðingar um eina hóskandi skiftistíð. Men kortini væntar landsstýrið harðar samráðingar.

Halda fast um skiftistíðina

Hvat innihaldið í nýggju modellunum hjá landsstýrinum er, hevur ikki borið til at fingið at vita. Men danska stjórnin hevur síðani seinasta samráðingarfundin í forsætismálaráðnum ferð eftir ferð gjørt greitt, at skiftistíðin ikki verður longur enn fýra ár.

Hetta hevur órógvað løgmann, sum í fjølmiðlunum hevur sagt, at hann ikki ætlar sær at skriva út fólkaatkvøðu um ein sáttmála um at skipa Føroyar sum fullveldi, verður greiða ikki fingin á skiftistíðini.

Fornermaðir danir forða fyri sjálvstýri

Danskir politikarar meta føroyska ynskið um sjálvstýri sum eitt álop á teir og danska mentan, heldur landsstýrismaðurin í fullveldismálum

EYÐUN KLAKSTEIN

- Danskir politikarar er firtnir inn á okkum. Teir taka tað sum ein kritikk av teimum og danskari mentan, at føroyingar ynskja at taka fulla ábyrgd av sær sjálvum.

Hetta sigur landsstýrismaðurin í fullveldismálum, Høgni Hoydal, við donsku avísina, Berlingske Tidende, í gjár.

Hann heldur, at danska forsætismálaráðið til eina og hvørja tíð hevur eina ætlan klára, sum skal forða fyri at føroyingar fáa sjálvstýrið.

- Donsk nationalisma er størsta forðingin fyri einum samráðingarúrsliti. Tí hvat hevði Danmark verið uttan sínar norðuratlantisku ognir. Tað hevði verið ábyrgdarleyst av einum donskum forsætisráðharra at fráskriva land- og sjóøki, sum er tríggjar ferðir størri enn Danmark, sigur Høgni Hoydal.

Landsstýrismaðurin heldur eisini, at danski forsætismálaráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, líður undir "personlig forfængelighed", tá tað snýr seg um føroysk viðurskifti.

- Eg veit ikki, um hetta er tengt at bankamálinum, men tað er óheppið, um persónligar kenslur skulu vera ein meinbogi fyri samráðingarnar. Vit eiga at kunna tosa saman sum vaksin fólk, sigur Høgni Hoydal við Berlingske Tidende.

Leiðslan fyri P/F Vágatunnilin ikki broytt avgerðina:

Hetta er fult lógligt

Onki komið fram, sum hevur fingið okkum at broyta støðu, sigur Klæmint Weihe

ÁKI BERTHOLDSEN

– Vit hava tikið eina avgerð og vit hava ikki broytt tað avgerðina enn.

Hørðu atfinningarnir ímóti leiðsluni í P/F Vágatunlinum fyri at hava tikið samráðingar upp við J&K Petersen um arbeiðið at gera vegirnar til undirsjóvartunnilin, hóast Byggitek hevði lægsta boð, hevur hevur ikki fingið byggiharran at broyta støðu.

Klæmint Weihe, formaðurin í nevndini fyri P/F Vágatunlinum, sigur, at enn er onki komið fram, sum hevur sannført teir í, at teir eru á skeivari kós.

Sakførari okkara metir ikki, at nakað ólógligt er farið fram, sigur Klæmint Weihe

Hann sigur, at útfrá eini heildarmeting er tilboðið hjá J&K Petersen tað besta fyri Vágatunnilin.

Og enn er onki nýtt komið fram, sum broytir tað.

Hann sigur, at hann kann ikki greiða frá smálutum í teirri heildarmetingini, tí tað er at ganga teimum ymsu byggifeløgunum ov nær.

–Men tað kunnu vera upplýsingar, sum eru komnr fram, eftir at tilboðini vórðu latin upp, sum hevur sannført okkum um, at J&K Petersen hevur tað besta tilboðið samanumtikið.

Tað hevur eisini verið ført fram, at í innbodnari útbjóðing er tað beinleiðis ólógligt at samráðast við næstlægsta tilboð og at gera tær uppstillingar og metingar av tilboðunum, sum Vágatunnilin hevur gjørt í hesum førum.

Eisini hesum vísir Klæmint Weihe frá sær.

– Tað hava vit spurt okkum fyri hjá sakførara okkara, Magnusi Petersen.

Og hann metir ikki, at nakað sum helst ólógligt er farið fram. Og eina uppstilling yvir tilboðini hava vit sjálvsagt loyvi at gera

Í blaðnum í morgin fara vit at útgreina nærri, hvørji sjónarmið, nevndarformaðurin fyri vágatunlinum, Klæmint Weihe, hevur.



AMSTERDAM
2997,-
Tur/retur via Billund **)
Ferðaavgjøld íroknað

ATHEN
3296,-
Tur/retur via Keypmannahavn *)
Ferðaavgjøld íroknað

LISSABON
3296,-
Tur/retur via Keypmannahavn *)
Ferðaavgjøld íroknað

LONDON
2991,-
Tur/retur via Billund **)
ella Keypmannahavn *)
Ferðaavgjøld íroknað

NICE
3107,-
Tur/retur via Billund *)
Ferðaavgjøld íroknað

PARÍS
3010,-
Tur/retur via Billund **)
Ferðaavgjøld íroknað

VENEDIG
3095,-
Tur/retur via Keypmannahavn *)
Ferðaavgjøld íroknað

DUBLIN
3094,-
Tur/retur via Billund *)
Ferðaavgjøld íroknað

Bíligir ferðaseðlar frá Maersk

Frá 1. juli til og við 13. august ber til at ferðast við flogfari millum Føroyar og onnur lond í Evropa, so bíliga sum ongantíð áður. Einastu treytir, at fáa bíligar ferðaseðlar, eru vanligar apex-treytir, umframt at minst tvey vaksin skulu ferðast saman. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

Børn undir 12 ár fáa 50% í avsláttri av flogprísium, tá ferðast verður saman við vaksnum

Ferðaseðlarnir skulu bileggjast minst 7 dagar frammanundan og í tíðarskeiðinum 1. juni 2000 til og við 16. juli 2000. Bileggingar kunnu ikki broytast. Ferðaseðlin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Minst tvey vaksin skulu ferðast saman.
**) Gisting eina nátt í Danmark (ikki íroknað)*
***) Flogið verður víðari sama dag*

MAERSK AIR